# Fiskivinnupolitikkur

**Hallbjørg Hansen**
*Valevni Tjóðveldisfloksins í Eysturoynni*



Tjóðveldisflokkurin virkar fyri einum fjølbroyttum sjálvberandi vinnulívi, ið tekur ábyrgd av umhvørvi, førleikamenning og trivnaði hjá lokalsamfelagnum og arbeiðsfólki og kastar av sær til samfelagið. Hetta er ein partur av tjóðveldisfloksins stevnumiðum. Tað hevur eydnast seinastu árini at fáa Føroyar longri burtur frá einari skipan við politiskari stýring av vinnuni, har studningur og fyrimunir verða latin einstøkum vinnum og fyritøkum, ið skulu bera øllum samfelagsbúskapinum.

Hetta skyldast sjálvsagt ikki bert førda politikkinum, men so sanniliga eisini tí fiskiríkidømi,vit føroyingar eru vælsignaðir við seinastu árini. Vit hava átt og eiga framvegis fólk úti um alt landið, ið hevur vilja og áræði at taka tøk tá á stendur. Fiski- og útróðrarmenn hava minni enn so altíð spunnið gull, sum teir hava gjørt seinastu árini. Tað hevur ofta verið trongt fíggjarliga at fingist við slíka vinnu, seinast - fyri minni enn 10 árum síðani, var tað vónleyst at vinna til lívsins uppihald við at rógva út, bæði tí at tað var lítið fiskarí og vánaligir prísir.

Eftir at vit fingu skipaðar økisfriðingar og at tiltøk vórðu sett í verk fyri at tryggja komandi fiskastovnarnar mest møguligt, hava vit upplivað, at tað er verulig gongd í hesari vinnu aftur. Tað skal tí vera mín vón, at teir batar, ið nú eru ætlaðir til tess, at tryggja hesari vinnu livilíkindi, framyvir skulu vinna frama - her verður hugsað um ætlanirnar at gera slík skott millum útróður og aðra fiskivinnu, at allir partar hava framtíðarmøguleikar. Eg haldi, at tað hevur stóran týdning, at vit varðveita bústaðarmynstrið í landið okkara. Ein týdningarmikil háttur at gera hetta er, at frammanfyri nevnda arbeiðið heldur fram. Tilfeingið er ogn føroya fólks og má ikki blíva annað.

Hóast tað nú sær út til at draga á luftina, hvat prísum á fleiri av okkara fiskavørum viðvíkur, so mugu vit seta álit okkara á, at vinnan kann klára hesi skerini, eins og hon so ofta fyrr hevur gjørt. Tað krevur sterkar leiðslur í vinnuni eins og politikkarar, tá soleiðis áleikar. Vit kunnu tó í ávísan mun freistast til at halda, at tað er rímiligt við almennum stuðuli til einstakar vinnur, tá hesar somu kanska fáa almennan stuðul í øðrum londum. Í seinastuni hava vit hoyrt um menningartiltøk, ið kunnu føra til nýggjar framleiðslur. Her kann tað vera skilagott, at tað almenna stuðlar uppundir verkætlanir, ið skapa tøkniliga menning og harvið nýggjar inntøkumøguleikar hjá virkjum og skipum í framtíðini.

Vit hava tíverri sæð, at tá nógv arbeiði er í landinum sum heild, t.v.s. at samfelagshjólini mæla í skjótara lagi, so hevur tað verið fiskivinnan á landi, sum hevur verið taparin, tá tað ræður um kapping um arbeiðsfólk. Tað hevur tí ongantíð verið meira neyðugt enn nú, at gera okkurt munagott fyri at fáa dugnalig fólk at støðast í hesi vinnu. Tjóðveldisflokkurin vil, at Fiskivinnuskúlin skal útbyggjast til ein veruligan havgranskingardepil, ið fevnir um øll lið í fiski- og alivinnu. Hetta skal m.a. virka við til, at arbeiðið í fiski- og alivinnuni skal virðast og váttast sum sergreint fakligt arbeiði, ið eisini gevur øktar møguleikar til at útbúgva seg víðari.

# Hevur handilsligt skil og varsemi verið galdandi seinastu 4 árini?

**Fríðálvur Jensen**



At siga 366 milliónir frá sær og stórt sæð onki fáa afturfyri, er ikki júst nakað ein skal ganga runt og reypa sær av

Um vit venda hesum á høvdið, so kann hetta samanberast við at fara út at keypa sær eina vøru, gjalda fyri hesa og siga, at handilin kann eiga vøruna.

Eg má siga, at tað er ikki lætt at skila orðini, sum verða slongd út frá tjóðveldisfólki í hesum døgum, at frælsi bert finnst í tí búskaparliga frælsinum - í mínari verð er frælsi annað enn bara pengar.

Vit kunnu eisini seta spurningin, um tíðin er komin, at vit skulu missa so stóran part av veitingini úr Danmark í einum - er hetta ein skilagóð fullveldisleið - ella er hetta bara eitt svar uppá, at danir ikki vildu veita føroyingum eina longri skiftistíð enn 4 ár - um so er, hava tit givið tykkum og føroyska fólkinum ein frammaná.

So kundi onkur skunda sær at sagt, at danir fara at krevja ein minking í blokkinum, tí undanfarnu fíggjarlógirnar hava givið avlop, men eg kenni onki til eitt slíkt krav, tí samráðast skal um blokkin, so slíkt kann ikki brúkast til nakað, sum helst.

**Vit og skil**

Var tað rætt, at vit søgdu farvæl til 366 milliónir júst nú, tá við hava fingið úttalilsir frá bankastjóra, sum sigur, at okkara høvuðsvinna hevur sæð sína gulltíð, og so skal ikki nógv til at hugsa sær, at tað fer at ganga hin vegin - vónandi ikki ov langt.

Vit í Sambandsflokkinum vilja sjálvandi, at leiðin eisini skal ganga ímóti tí frælsinum, at vit kunnu hava ein sjálvberandi búskap, men hava eisini tað stevnu, at hetta skal gerast við skili, og tá vit lata nakað frá okkum, skuldu vit gjarna fingið eitthvørt afturfyri.

Vit vita eisini, at tað eru økir í landinum, har peningur skal til, t.d. innan almanna- og heilsuøkið, so tað er púra óskiljandi, at hesir menn siga pening frá sær, uttan at hyggja eftir hvussu tað gongst í høvuðsvinnuni.

**Leiðin fram**

Eisini á hesum økinum er tað neyðugt at fáa nýhugsan og nýtt fólk framat, sum kann leggja ein skilagóðan politikk tilrættis, sum Føroya fólk kunnu kenna seg trygg við og okkara eftirkomarar kunnu taka upp eftir okkum.

Hetta vil Sambandsflokkurin berjast fyri í eini komandi samgongu!

# Eigaraíbúðir og leiguíbúðir til rímiligar prísir

**Kári Petersen**
*Valevni javnaðarfloksins í Suðurstreymoy*



Tann óforsvarligi fíggjarpolitikkurin hjá landsstýrinum hevur ført til 50 prosent hægri sethúsaprísir uppá bert 4 ár, so sethúsakostnaðurin er komin uppá 1,5 til 2 mió. kr. Javnaðarflokkurin hevur tí gjørt uppskot til nýggjan íbúðarpolitikk, fyri at geva teimum ein møguleika, sum ikki ynskja ella klára at byggja hús fyri 1,5 milliónir. Við uppskotinum verður møguleiki at fáa íbúðir fyri sámuligar prísir, t. d. verður møguleiki at fáa eigaraíbúðir uppá 80 fermetrar fyri 800 tús. kr., ella sum leiguíbúðir fyri 3500 kr. í leigu um mánaðin.

**Sethúsaprísirnir hækkaðir 50 prosent í bert 4 ár.**

Í tey fýra árini hetta landsstýrið hevur sitið, eru árligu útreiðslurnar hjá landskassanum øktar við 1080 mió. kr., tað er 40-45 prosent uppá bert 4 ár. Landsstýrið hevur við tí óforsvarliga fíggjarpolitikkinum sett eina fastognarinflatión í gongd, so sethúsaprísirnir eru hækkaðir við 50 prosentum uppá bert 4 ár.

Vantandi íbúðarpolitikkur landsstýrisins: Ungfólk gjalda 5-7.000 í leigu fyri íbúðir, ella 1,5 til 2 milliónir fyri hvørt hús.

Tað unga ættarliðið skal nú gjalda prísin fyri tann óforsvarliga fíggjarpolitikkin við sethúsaprísum uppá 1,5 til 2 milliónir. Um ein skal gjalda eitt hús uppá 1,6 milliónir krónur, so skal ein gjalda 12-13.000 krónur um mánaðin í lánsgjaldi. Øll tey, sum ikki hava ráð at seta seg fyri eitt hús uppá 1,5 mió., eru noydd at leiga sær okkurt, og húsaleigan er ofta 5.000-7.000 um mánaðin. Tað verður ein stórur órættur framdur móti øllum teimum, sum ikki klára at keypa, tí tey ofta gjalda dýra leigu í nógv ár, og tí ikki fáa gjørt nakra uppsparing, men noyðast at blaka 5-7000 kr. burtur í leigukostnaði hvønn mánað.

**Nýggi íbúðarpolitikkur javnaðarfloksins:**

Meðalstórar eigaraíbúðir til ungfólk og størri eigaraíbúðir til eldri fólk.

Fyri at bøta um fylgjurnar av tí óforsvarliga fíggjarpolitikkinum hjá landsstýrinum, ætlar javnaðarflokkurin í fyrsta lagi at broyta lógina um Húsalánsgrunnin, so grunnurin kann byggja nógvar íbúðir, sum koma at kosta um 800 tús. krónur (umleið 80 fermetrar). Hetta skal tæna trimum endamálum.

Fyrsta endamálið er at økja um útboðið av íbúðareindum, so prísirnir á bæði húsum og íbúðum kann koma niður á eitt meira vanligt støði aftur.

Næsta endamálið er at lata ungfólk keypa íbúðir, so tey hava nakað sum tey kunnu spara upp í, so tey hava 4-500 tús. í eginpeningi aftaná 7-10 ár. Um tey selja, kunnu tey nýta eginpeningin til at keypa okkurt størri. Í staðin fyri at hava goldið 5.000 um mánaðin í leigu, hava tey goldið 5.000 í uppsparing.

Triðja endamálið er, at eldri fólk, sum ikki ynskja at hava eini stór hús at røkja, skulu hava møguleikan at selja fyri at flyta í okkurt minni. Harvið fáa tey eisini frígjørt kontantan pening. Íbúðirnar hjá teimum eldru eiga helst at vera nakað størri enn hjá ungfólki, t. d. 100 fermetrar. At eldri fólk selja sethús, ger at tey, ið hava plásstørv, til dømis familjur við børnum, kunnu keypa.

**Nýggi íbúðarpolitikkur javnaðarfloksins 2:**

Leiguíbúðir til tey, ið ikki ynskja at keypa.

Í øðrum lagi, so ætlar javnaðarflokkurin at broyta MVG-lógina og lógina um rentustuðul, so íbúðarfeløg fáa rætt til MVG-frítøku og til rentustuðul. Sambært útrokningum kunnu fólk harvið fáa íbúðir uppá 80 fermetrar til leigu fyri 3500 kr. um mánaðin. Við rentustuðuli og MVG-frítøku eru íløgur í leiguíbúðir ein lønandi íløga fyri stovnsligar íleggjarar, sum til dømis tryggingarfeløg. Fyri almennar myndugleikar sum kommunur(sum ofta útvega íbúðir til sosialt illa stillað) og fyri Húsalánsgrunnin fer tað somuleiðis at vera fíggjarliga forsvarligt at gera tílík feløg. Verður uppskotið framt, fer tað tí skjótt at føra til eitt vaksandi útboð av leiguíbúðum fyri sámuligar prísir.





# Fasta sambandið um Lorvík

**Randi í Jógvanstovu**

Tá vit, hesumegin Leirvíksfjørð, ikki halda nógvan gang, tá tosið snýr seg um fast samband millum Norðoyggjar og Eysturoynna, er tað ikki tí, at vit onga meining hava hesum viðvíkjandi. Vit ynskja tykkum "norðanfjørðs" alt gott og ikki minst eitt gott samband um fjørðin, tað skal eingin ivi verða um tað. Vit eru fullvæl greið yvir, at tit hava brúk fyri einum stabilum og betri sambandi, enn tað tit hava í løtuni.

Vit ynskja ikki at liggja "í buktini" sum onkur kanska hevur hug at halda. Vit vilja hjartans gjarna tað besta fyri tykkum, taki ikki feil av tí.

Men at røkta áhugamál bygdafólksins hesumegin fjørðin er nú einaferð tað, vit eru sett til, og tað gera vit eisini í hesum málinum.

Leirvík er ikki nøkur stór bygd, gott 800 borgarar, men vit seta trivnaðin í hásæti. Vit ynskja, at tað eisini framyvir verður liviligt fyri familjur við børnum og øll onnur, sum skulu búgva her. Ein vegur gjøgnum bygdina við allari ferðsluni úr/í Norðoyggjar, sum í 2001 taldi um 100.000 bilar, kunnu vit ikki liva við, fyrigev okkum, møguliga heldur onkur, at vit eru "smásár". Tað halda vit ikki sjálvi.

Ein tunnil undir bygdini er okay við okkum. Tit sleppa suðureftir, og vit sleppa undan ferðsluni. Um so er, at tað ikki er gjørligt við einum tunnli undir bygdini, so er alternativið ein brúgv. Brúgv? Ljóðar kanska utopiskt, men kemur tunnil upp úti á Ennið, kann grótið verða lagt út á fjørðin og norðureftir. Ein brúgv kundi verði bygd millum hetta nýggja grótkastið og tað núverandi. Ein brúgv, sum er 50-60m lang og um 20m høg. Eisini á hendan hátt sleppa vit undan ferðsluni gjøgnum bygdina.

Nei, fasta sambandið um fjørðin hava vit einki ímóti. Einki at ivast í. Undirsjóvartunnilin verður til stóra gleði fyri nógv fólk, og eisini fyri vinnuna har norðuri.

Til tykkum, sum í løtuni sita og viðgera hetta málið. Gloymi ikki okkum leirvíkingar. Í 2001 flutt "Dúgvan" knapt 100.000 akfør um fjørðin. Stórur partur av hesum vóru stórir bilar. Tað vil verða ótoluligt at búgva.

At tosa um at leggja ein veg omanfyri bygdina loysir ongan trupulleika uppá sigt. Tað er bert ein spurningur um tíð, so verða fólk at búgva har eisini.

Tað er okkara framtíð, tit taka avgerð um. Taki tí eina avgerð, sum ikki spillir okkum bygdina.

# Hvat er galið?

**Kai Vágfjall**



Orðatakið sigur: Ger skálkinum væl, og hann lønar tær aftur við háð og spott. Hetta orðatak kom fram fyri meg, tá eg las valúrslitini frá fólkatingsvalinum 20. november í fjørð. Her hugsi eg serliga um heimbygd mína Vág og um úrslitið úr Vágum.

Tað hava altíð verið sjálvstýrismenn, sum hava gingið undan í Vági. Teir hava settu virkir á stovn og skapað arbeiðspláss til hundratals fólk í bygdini. Líta vit okkum íkring í dag, er støðan framvegis soleiðis, at næstan allir vinnulívsmenn í bygdini eru sjálvstýrismenn. Hetta eru menn, sum hava vágað nakað og víst dirvi. Teir hava ikki rópað eftir donskum blokki, nei, teir hava skapað nakað fyri bygdirnar og fólkið.

Størsti flokkur í Vágs Býráði er tjóðveldisflokkurin. Henda býráðssamgongan hevur gjørt eitt stórt arbeiði og hevur sitið í fleiri valskeiðum. Hon hevur gjørt góðar karmar fyri vinnulívið. Loyst vatntrupuleikarnar. Loyst kloaktrupuleikarnar. Og um ikki so langa tíð, so verður ein djúphavn gjørd í Vági, sum er hesum býráði og sitandi landsstýrissamgongu fyri at takka.

Tí er tað sera hugstoytt fyri meg, at vágbingar tveita so nógvar atkvøður burtur til sambandsflokkin og javnaðarflokkin. Veit ikki hvat hesir báðir flokkar hava gjørt fyri Suðuroynna ella fyri Vág. Har skal eitast at búgva ein javnaðartingmaður, sum hevur sitið á tingi í kanska 15 ár. Hví og hvør tað er sum velur hendan mannin, veit eg ikki, men um nakar kundi fortalt mær hvat hann hevur gjørt fyri vágbingar, skuldi tann persónur fingið premiu.

Eitt komi eg nú í tankar um, hvat hesin maður hevur gjørt. Hann hjálptu eysturoyingum at fáa eina sjóvegis rutu inn á Skálafjørðin, sum hevði gott samband frammanundan eftir landi. Aftur fyri fekk hann teir at hjálpa sær at fáa Smyril at sigla á Vág leygardag – fyri vinnulívið í Vági. Ein sannur brandur.

Síðani hevur ein sambandsmaður bjóða seg fram. Er hann nevndur so er hann kendur. Hansara ævintýr í Vági man ikki hava kosta samfelagnum so lítið. Nú stendur hann fyri einum virki, sum hann neyvan hevur ofra eina krónu uppá úr egnum lumma. Síggi hann rópa eftir donskum blokki í bløðunum. Vorðið sum hugsjónarmaður.

Sverri Midjord er so himmals fegin um at Tvøroyri er háborgin hjá javnaðarflokkinum. Jú væl gagnist. Teir hava so ikki skapað tey stóru virðini har á leið, uttan at tað almenna hevur veri uppí. Úrsliti er, at tvøráfólk í dag mugu bøta fyri tað í ólukkumát. Tað var sjálvandi ein orsøk til at oljuútgerðahavnin ikki varð løgd á Drelnesi. At sita hendur í favn og einki gera, men krevja at fáa alt upp í hendurnar borði, tað er rættur javnaðarpolitikkur.

Teir røttu vinnulívsmennirnir á Tvøroyri, sum hava vágað nakað sjálvir eru sjálvstýrismenn og ikki sambands- ella javnaðarmenn. Teir liggja ikki og sova, til ein stendur við einum donskum kekki og biður tey koma og gera nakað til nyttu.

Í ártíggjir hava vágafólk gartera í at fáa fast samband við Streymoynna. Harðasti mótstøðumaður ímóti undirsjóvartunnlinum var sambandsmaðurin Edmund Joensen, hann fór so vítt at hann koyrdi Sámal Petur í Grund frá sum landsstýrismann, tí hesin tók stig til hendan tunnil. Nú er so hesin tunnil vorðin verðuleiki, og tunnilin til Gásadals er farin í gongd. Tøkkina geva tey sambandsflokkinum, hesin flokkur sum mótarbeiddi teimum við hond og fót. Óskiljandi bakbit.

Flogvøllurin skal útbyggjast. Hann verður ikki útbygdur so leingi hann er danskur, so tað er eisini óskiljandi at tey eru ímóti yvirtøkuni av flogvøllinum. Samstundis skal Skipaeftirlitið leggjast í Vágum.

Fyri at venda aftur til Suðuroynna, so skal eg minna á, at tað er hendan samgongan, sum hevur tikið stig til at byggja:

* nýggjan "Smyril"
* stuðla djúphavn í Vági
* nýggja samferðsluhavn á Tvøroyri
* raðfest tunnil millum Hov og Tjaldavík
* nýggjan miðnámsskúla í Vági
* almanna og heilsuskúlin á Tvøroyri.

Havi neyvan fingið alt við.

Skal minna á, at tað var sera hugstoytt at hoyra bygdamann okkara Hans Paula Strøm á Rás 2 skýra nýggja miðnámsskúlan í Vági fyri eitt undirhaldssirkus. Hatta vísir hvat hjartalag javnaðarmenn hava fyri okkara bygd.

Tá javnaðarflokkurin sat í andstøðu í 80-unum, og Pauli Ellefsen var løgmaður, plagdi Atli Dam at siga, at sambandsflokkurin var turrgeldur. Nú er ikki so stórur munur á hesum báðum flokkum. Jóannes Ejdesgaard boðar nú frá, at hann vil sleppa í samgongu við sambandsflokkinum eftir valið. So tá tveir geldingar leggja saman, er ikki nógv at vanta.

Eg fari tí at heita á tykkum suðringar, um at hugsa tykkum væl um til komandi løgtingsval, at tit atkvøða fyri teimum flokkum, sum vinnulívsfólkið her í oynni stuðlar, og ikki geva atkvøður tykkara til tey, sum liva av at nassa. Ikki fyri vinnulívsmennirnar skuld, men fyri okkara egnu, tí neyvan nakað landsstýri hevur fingið so nógv av skafti hesi fýra árini, sum hetta.

Listin hevði verið langur, um eg skuldi nevnt alt tað sum hendan samgongan hevur gjørt fyri Føroya land, men tað má bíða til eina aðru ferð.

**Stórur brúktbila-marknaður**



**Mazda 323 HB 1,3 LX**
bláur, 5 hurðar, 5 gear,
árg. 09/85
**5.000,-**




**Mazda 323 S 1,5i LX**
reyður, 4 hurðar, 5 gear,
árg. 05/97, km 69.000
**78.000,-**



**Mazda 323 S 2,0 D LX**
gráur, 4 hurðar, 5 gear,
árg. 06/98, km 84.000
**105.000,-**




**Mazda 323 S 1,3 LX**
bláur, 4 hurðar, 5 gear,
árg. 04/87, km 196.000
**15.000,-**




**Mazda 323 S 1,3 LX**
reyður, 4 hurðar, 5 gear,
árg. 1987, km 136.000
**6.000,-**



**Ford Escort St. car 1,6 Ztec**
grønur, 5 hurðar, 5 gear,
árg. 06/98, km 33.000
**92.000,-**



**Renault Megane 1,4e**
grønur, 5 hurðar, 5 gear,
árg. 08/98, km 34.000
**94.000,-**




**Renault Megane 1,6e**
reyður, 5 hurðar, 5 gear,
árg. 12/96, km 70.000
**80.000,-**



**Renault Megane 1,6e Sedan**
beige, 4 hurðar, 5 gear,
árg. 06/98, km 38.000
**105.000,-**




**Renault Twingo**
reyður, 3 hurðar, 5 gear,
árg. 04/99, km 48.000
**64.000,-**



**Suzuki Baleno 1,3 GL Plus**
gráur, 4 hurðar, 5 gear,
árg. 10/96, km 69.000
**48.000,-**



**Toyota Corolla 1,3 Hatchback**
reyður, 3 hurðar, auto gear,
árg. 07/97, km 40.000
**79.000,-**



**Toyota Corolla 1,6 Luna**
reyður, 5 hurðar, 5 gear,
árg. 04/98, km 40.000
**98.000,-**




**Toyota Hi-Lux Pick-up Diesel**
bláur, 2 hurðar, 5 gear,
árg. 12/94, km 122.000
**90.000,-**

**BERG MOTORS**
Staravegur 1-3 • Tel. 31 35 35 • Fax 31 77 35